Sosialurin

# VARPIÐ

F R Í G G J A D A G U R 3. f e r u a r 2 0 0 6



**Barnaár míni í Paradís** DR2

Hon er 97 ár og er eitt av teimum síðstu eygnavitnunum. Helene Berg Rasmussen búði á teimum donsk-vestindisku oyggjunum, tá ið danski staturin í 1917 seldi oyggjarnar til amerikanar. Í sendingini sigur hon frá, hvussu tað var at hitta "teir svørtu", hon sigur eisini frá tí vøkru náttúruni og lívinum á Denmark Hill - tað táverandi ØK-høvuðssætið og núverandi guvernørbústaðurin.

**Týsdag 7. kl. 18.30**



**Ekkó - at liva við krabbameini** svf

Hvørt ár fáa umleið tvey hundrað føroyingar at vita, at teir hava krabbamein. Við eitt vendir verðin øðrvísi og ótti, stúran og vón gerast nærverandi partar av gerandislívinum. Hóast viðgerðarhættirnir eru vorðnir betri, so doyggja umleið hundrað føroyingar árliga av krabbameini. Gongdin seinnu árini hevur verið, at fólk nú liva longri við sjúkuni. Felags fyri øll er tó, at sjálvt lívið verður avgerandi broytt frá tí degi, at sjúkan er staðfest. Í Ekkó sunnukvøldið verður tosað við nakrar føroyingar, har sjúkan hevur ein týðandi leiklut í lívi teirra. Bergljót D. Hentze og Ivan Niclasen hava lagt sendingina til rættis.

**Sunnudag 5. kl. 20.00**

**Dracula** 3 VIASAT

Fyri stuttum kom føroysk skaldsøga út har vampyrar reika runt á Føroya landi. Hesin filmurin er grundaður á klassisku ræðusøguna um Vlad Dracula greiva (Gary Oldman). Hin blóðtysti greivin endar í viktorianska London í leitan eftir sínum lívsins kærleika, sum hann misti fyri fleiri hundrað árum síðan. Ræðufilmur frá 1992, leikstjórnað hevur Francis Ford Coppola.

**Fríggjadag 3. kl. 23.40**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**